# Eldri og yngri tónar



*Heiðrun Petersen, violinspælari, fekk gávugóðs upp á 15.000 kr frá Jacob Gade Fonden*

**Leygarkvøldið var konsert í Norðurlandahúsinum við Føroya Symfoniorkestri, kóri og solistum, umframt handan av virðislønum. Konsertin fevndi víða bæði stílsliga og í tíð, frá síðst í 1700-talinum fram til í dag, frá klassiskum kórverki til modernaðan symfoniskan tónleik. Elsta verkið var ein kórmessa eftir Joseph Haydn. Umvegis tónleik hjá W.A Mozart, Edvard Grieg og Jacob Gade, fingu vit heilt nýggjar tónar frá Tróndi Bogasyni, hvørs verk The Puzzle var frumframført á konsertini**

UMRØÐA

*Hans Olivur Joensen*
*Myndir: Sunva Ey. Lassen*

### Haydn og Kór Føroya Symfoniorkesturs

Fyrsti partur av konsertini var framførsla av kórverkinum ”Missa in angustiis” eisini nevnt ”Nelson Messa”. Verkið er skrivað síðst í 1790unum. Haydn hevur skrivað tólv messur og hendan var ímillum tær síðstu seks, hann skrivaði. Hetta tíðarskeiðið verður mett sum hæddarpunktið í hansara liturgiska kompositiónsvirksemi. Verkið bleiv framført av symfoniorkestri, úrvælskóri og fýra ungum útlendskum sangsolistum.

Tónleikurin og latínski teksturin vekja kenslur, sum fevna frá djúpum vónloysi til stóran fagnað. Verkið er skrivað í tíðini beint undan at oratoriið ”Skapanin” var skrivað. Á konsertini leygarkvøldið hoyrdist og sást skjótt, at bæði orkestur, dirigentur og sangarar vóru væl fyri. Verkið er býtt í satsir, sum svara til katólsku messuna við pørtunum Kyrie, Gloria, Credo, Sanctus, Benedictus og Agnus Dei. Nakrir av hesum pørtum vóru býttir í minni partar. Verkið vardi í umleið 40 minuttir. Tónleikurin peikaði í støðum aftur í móti baroktónleiki. Fleiri av satsunum vóru lívligir, serliga 2. satsur, 3. satsur og endin. Verkið er skrivað fyri 4 sangsolistar, tveir kvinnuligar, sopran og mezzosopran og tveir mannligar, tenor og bass. Tað var tó serliga sopranrøddin, sungin av norsku Lina Johnson, sum hevði størsta sangleiklutin. Ein stuttur partur í 2. parti var sungin av bassinum Thomas Christian Sigh. Hinir solistarnir vóru mezzosopranurin Diana P. Vistisen og tenorurin Otte Ottesen. Í 3. parti var bert kór og orkestur. Sum heild eitt orkumikið tónleikaverk við einum veti av eingilskum tóna í sær. Kórparturin í hesum verkið var sera stórur og berandi. Burtursæð frá at balansan millum solistarnar ikki altíð var heilt góð og einkultum ikki heilt neyvum innsatsum frá kórinum, var talan um eina góða og væleydnaða framførslu.

### Frumframførsla av ”The Puzzle”

Aftaná kórverkið hjá Haydn var steðgur. Áðenn frumframførsluna hjá Tróndi Bogasyni, vóru ymiskar broytingar gjørdar í uppstillingini, m.a. kom flygil, umframt ymisk slagverk á pallin. Tróndur Bogason fekk í summar prógv sum komponistur á konservatorium í Keypmannahavn. Symfoniorkestrið hevði umbiðið verkið til hesa konsertina. Við einum sentralum klarinettlagi, glíðandi tónum og rútmiskum avbjóðingum í violinum, alternativum sláiteknikki á sello, jarnplátu (thunderplate), sum verður rist og skapar eitt torukent ljóð saman við stórari basstrummu, gonggong og minimalistiskum klaverfigurum, hoyrdu við nýggja verkið The Puzzle. Prinsippið í verkinum er ein uppdeiling av orkestrinum í instrumentbólkar við ymiskum motivum ella klangum, sum verða settir upp ímóti hvørjum øðrum á ymiskan hátt. Tá hesir ymisku bólkar verða settir saman ljóðliga, gerst tað ljóðbílæti fullkomuliga øðrvísi enn í traditionellum harmoniskum tónleiki, hetta krevur at komponisturin hevur serligan kunnleika til tey ljóðføri sum skulu nýtast. Har vóru bæði neoklassisk og atonal eyðkenni í tónleikinum. Talan er um eitt vælsamanhangandi verk uppá góðar 15 minuttir, rytmiskt



